# Nýggjur fótbólts-vøllur er neyðugur



GAMAL OG SLITIN

*Hóast kommunurnar í Sandoynni eru sperdar fíggjarliga, er formaðurin í Sandoyar Skúlasambandi slett ikki í iva um, at tað hevur skund at fáa nýtt graslíki á fótbóltsvøllin Inni í Dal*

Vilmund Jacobsen

Tað eru kommunurnar í Sandoynni, ið standa aftan fyri Sandoyar Skúlasamband, sum aftur stendur aftanfyri Meginskúlan á Sandi og fótbóltsvøllin Inni í Dal, tey rópa.

Gerhard Lognberg hevur í fleiri ár verið formaður í Sandoyar Skúlasambandi, og hann sigur, at arbeitt verður við at fáa verkætlanina upp á pláss, soleiðis at sandoyingar kunnu hava ein vøll við nýggjum graslíki til kappingarbyrjan næsta ár.

– Men hetta er ikki so lætt, tá kommunurnar í oynni, sum skulu byggja vøllin, eru sperdar fíggjarliga.

Hann vísir á, at okkurt er um, at Fótbóltssamband Føroya kann lata stuðul til verkætlanina, men hann sigur seg ikki vita, um talan soleiðis kann gerast um fjórðing, triðing ella helvt av íløguni.

– Vit eru í løtuni í holt við at kanna hesar møguleikar, men eru ikki komnir á mál enn, leggur hann aftrat.

**... hetta er nakað, sum má gerast nú, tá evsta freist rennur út...**
GERHARD LOGNBERG

### Evsta freist

Gerhard Lognberg sigur, at sandoyingar hava fingið at vita frá FSF, at vøllurin má gerast av nýggjum. Annars verða eingir dystir leikir á Sandi í komandi kappingarári.

– Hetta er greið tala, men eg eri ikki fult greiður yvir, um hetta bara er galdandi fyri Vodafon-deildina. Hinvegin er hetta nakað, sum má gerast nú, tá evsta freist rennur út, sigur hann.

Fótbóltsvøllurin Inni í Dal er millum teir elstu í Føroyum, sum ikki eru lagdir við nýggjum graslíki.

– Eg haldi, at hesin vøllurin er frá seinna helmingi av áttatiárunum. Hann er slitin og vánaligur, og vit í Sandoyar Skúlasambandi eru fullgreið yvir, at graslíki má skiftast, sigur hann.

### Turt og gott

Gerhard Lognberg heldur annars ikki, at so nógv verður at gera við undirlendið undir graslíkinum, sum hann heldur er rímiliga turt og gott.

– Men tá hetta kortini er ein íløga, sum helst fer at liggja rundan um tvær miljónir krónur, og lítil og eingin peningur er at arbeiða við, er greitt, at vit heldur ikki bara kunnu rista hesa verkætlan úr ermuni, sigur hann.

Formaðurin í Sandoyar Skúlasambandi er kortini slett ikki í iva um, at tað hevur skund at fáa nýtt graslíki á fótbóltsvøllin Inni í Dal.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Gerhard: Ítróttarhøllin kemur væl við í oynni

**SANDUR** Herfyri varð lendisarbeiði til ítróttarhøll, sum skal byggjast Inni í Dal á Sandi, boðið út, og í seinasta lagi hin 1. desember í ár skulu tilboð upp á liðugtgerð verða komin Landsverki í hendi

Vilmund Jacobsen

Tað fer eftir øllum at døma ikki at ganga so long tíð, til sandoyingar hava eina ítróttarhøll á Sandi.

Lendis- og planeringsarbeiði er boðið út, og á seinasta fundi í bygginevndini varð sett út í kortið, at tilboð upp á liðugtgerð skulu verða Landsverki í hendi í seinasta lagi hin 1. desember í ár.

Soleiðis er eisini væntandi, at ítróttarhøllin á Sandi kann standa liðug einaferð í komandi ári, um alt gongur væl.

### 27 miljónir krónur

**... vit eru sjálvandi ógvuliga fegin um, at henda verkætlan er við at mynda seg...**
GERHARD LOGNBERG

Gerhard Lognberg, sum er ein av limunum í bygginevndini, sigur, at nóg mikið av peningi er sett av á fíggjarlóg løgtingsins til at gera lendið, har ítróttarhøllin skal byggjast, byggibúgvið.

– Tað er landskassin, sum byggir ítróttarhøllina Inni á Dal, og tað er soleiðis Landsverk, sum er byggiharri. Brúkast kunnu í mesta lagi 27 miljónir krónur til hesa verkætlan, men nú tíðirnar eru fíggjarliga trengri, enn tær hava verið í nógv ár, er ikki vist, at verkætlanin ikki kann fremjast nakað bíligari.

Tey, sum sita í bygginevndini aftanfyri ítróttarhøllina á Sandi, eru eitt nú tvey umboð fyri Sandoyar Skúlasamband, sum umboðar kommunurnar í oynni, skúlastjórin við Sandoyar Megin-skúla, eitt umboð fyri B71, umboð fyri Mentamálaráðið og umboð fyri Landsverk.

### Fegin og spent

Bygginevndin hevur í tíðarskeiðnum, hon hevur sitið, verið ein rundtúr kring oyggjarnar og hevur hugt at ymiskum ítróttarhallum.

– Vit í Sandoynni eru sjálvandi ógvuliga fegin um, at henda verkætlan er við at mynda seg, og vit eru sera spent eftir at fáa hesa høll upp at standa, sigur Gerhard Lognberg, sum er annað umboðið av tveimum umboðandi Sandoyar Skúlasamband í bygginevndini fyri verkætlanina.

*vilmund@sosialurin.fo*